## Noregi nýtist ikki ES ella EBS

Ein kanning, sum uttanríkispolitiski stovnurin í Oslo hevur gjørt, kemur til ta niðurstøðu, at tað fær ikki stórvegis ávirkan, hvørt Noreg fer upp í ES, varðveitir verandi EBS-skipan ella fær eina skipan sum ta sveitsisku, sum ber í sær, at landið skal gera semju við ES um hvørt málsøki sær.

Fer Noreg upp í ES, fer tað serliga at ávirka landbúnaðin og fiskivinnuna. Granskararnir siga, at ES-limaskapur fer at gera, at norsku bøndurnir fara at fáa minni stuðul, enn teir fáa í dag, men nakað annað er, at teir kortini fara at missa ein part av stuðlinum orsakað av komandi broytingum hjá heimshandilsfelagsskapinum.

Skal Noreg hava eina skipan sum ta sveitsisku, er fiskurin góður at hava sum býtisvøra, siga granskararnir, men samstundis siga teir, at fer Noreg upp í ES, kann roknast við, at ES fer at broyta sín fiskivinnupolitikk, sum hann fer at líkjast meiri tí norska.

## Potter í rættin

JK Rowling, sum hevur skrivað tær væl umtóktu bøkurnar um Harry Potter, hevur stevnt amerikanska blaðnum New York Daily News, tí blaðið hevur prenta brot úr teirri fimtu Harry Potter-bókini, sum kemur út í dag.

Blaðið prentaði mikudagin brotúr nýggju bókini og avdúkaði samstundis fleiri av teimum mest spennandi táttunum í bókini. Tí vilja RK Rowling og útgevarafelagið í USA hava endurgjald, og tey hava nú stevnt blaðnum eftir fleiri milliónum dollarum, sum tey halda seg hava mist.

Kortini er áhugin fyri Harry Potter framvegis líka stórur í USA. Amerikanarar hava bílagt meiri enn eina millión eintøk av nýggju bókini, og forlagið hevur prentað átta milliónir eintøk til tann amerikanska marknaðin.

## Umstrídd lóg samtykt

Hóast fleiri av teimum stóru fronsku fakfeløgunum hava mótmælt uppskotinum, hevur undirhúsið í tjóðartinginum í París samtykt eina lóg, sum ger, at fransmenn skulu verða longri á arbeiðsmarknaðinum fyri at fáa pensjón.

87 tinglimir atkvøddu fyri uppskotinum og 20 ímóti. Serliga sosialistarnir hava mótmælt uppskotinum, sum teir siga vera tað grovasta álopið á franska vælferðarsamfelagið í mong ár.

Sum er gevast flestu fransmenn at arbeiða, tá teir eru um 60 ára aldur, men nýggja lógin krevur, at teir skulu verða longri á arbeiðsmarknaðinum fyri at fáa somu pensjón sum nú. Stjórnin sigur, at broytingin er neyðug fyri at fíggja tær altsamt veksandi pensjónsútreiðslurnar. Somu tankar eru frammi í Týsklandi og Italia.

### Tystur norðmaður

Løgreglan á markinum millum Danmark og Týskland tók í vikuni ein norðmann, sum hevði 3.333 kassar av øli ella 80.000 ølfløskur, sum hann hevði stúgvað saman í einum viðfestivogni.

Løgreglan sigur, at maðurin skuldi koyra ølið til eitt ávíst stað í Danmark, haðani tað so skuldi sendast til Noregs í smærri nøgdum. Vanliga fáa tey, sum smugla ov nógv øl um danska markið, bót, men í hesum førinum var nøgdin so stór, at norðmaðurin kann vænta at enda í fongsli, sigur løgreglan.

Danska stjórnin hevur seinastu árini roynt fleiri stig fyri at tálma tí stóra ølkeypinum sunnan fyri markið, men uttan stórvegis úrslit. Tað er heldur ikki so løgið, at fólk fara um týska markið at keypa øl. Í vikuni kostaðu fimm kassar av øli 200 krónur har.

# Skuldi kvetta Brooklyn Bridge



*Al-Qaeda ætlaði at kvetta veirarnar, sum halda Brooklyn-brúnni uppi, men umfatandi vaktarhald fekk yvirgangsmannin at sleppa ætlanini*

**Ein lastbilaførari hevur viðgingið, at hann skuldi kvetta veirarnar, sum halda stóru brúnni Brooklyn Bridge í New York.**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*

Tann 34 ára gamli lastbilaførarin Iyman Faris hevðái fingið boð frá felagsskapinum al-Qaeda um at oyðileggja veirarnar, sum halda Brooklyn-brúnni uppi. Løgmálaráðið í Washington sigur seg hava prógv fyri, at ætlanin var klár, og lastbilaførarin skal hava játtað, at hann var við til at leggja ætlanina til rættis.

Sjálvur skal tann 34 ára gamli maðurin hava sagt løgregluni, at hann gjørdi av at sleppa ætlanini, tí brúgvin er ov væl vard. Hann hevði tí sent sínum yvirmonnum boðini "Tað er ov heitt", og tey merktu sambært løgregluni, at tað bar ikki til at fremja atsóknina.

Iyman Faris er føddur í Kashmir. Hann kom til USA í 1994 og hevur verið amerikanskur ríkisborgari síðani 1999.

Amerikanski løgmálaráðharrin, John Aschroft, sigur, at í gerandisdegnum var maðurin raskur og álítandi, men samstundis var hann yvirgangsmaður. Hevði hann fullført ætlan sína, hevði tað kostað nógvum amerikanarum lívið, tí ferðslan um Brooklyn Bridge er ovurstór.

# Drupu sivilfólk og lótu særdar hermenn liggja

**Amerikansku hermenninir skutu sivilfólk í krígnum í Irak. Teir drupu eisini særdar irakskar hermenn og lótu aðrar liggja á vígvøllinum.**

IRAK-KRÍGGIÐ
*Árni Joensen*

Ein av amerikansku hermonnunum, tann 22 ára gamli Michael Richardson, sigur við enska blaðið Evening Standard, at hann hevði ongar trupulleikar av at skjóta fólk, sjálvt um tey vóru í sivilum klæðum. Vóru tey har, vóru tey fíggindar, sama um tey vóru í hermannabúna ella ikki, sigur hann við blaðið.

Ein annar hermaður, Anthony Castillo, sigur tað sama.

- Komu vit fram á sivilfólk, gjørdu vit tað, sum vit skuldu gera, sigur hann.

Teir báðir amerikansku hermenninir leggja afturat, at irakar brutu eisini tær lógir, sum eru galdandi í kríggi, tí nógvir irakar, sum bardust ímóti amerikanarunum, vóru í sivilum klæðum. Teir nevna millum annað, at í einum bardaga vestan fyri Bagdad, bardust teir við 400 irakar, og at 70 prosent av irakunum vóru í vanligum klæðum.

- Tað ringasta, sum ein kundi gera, var at hjálpa einum særdum iraka. Vit vildu ikki hava nakrar krígsfangar. Tá ein berjist ímóti øðrum, er ein so ræddur og hatar fíggindan so nógv, at tað kann ikki sigast við orðum. Men fyri at siga tað stut: Vit vildu ikki, at teir skuldu yvirliva, sigur amerikanski hermaðurin John Meadows við Evening Standard.

Teir tríggir hermenninir greiða eisini frá, at sivilklæddir irakar vórðu tiknir upp í amerikansk hernaðarakfør og síðani skotnir. Tað ráddi um at fjala drápini, so eingin tók mynd ella filmaði tað, sum hendi, siga teir.

Hermenninir halda kortini ikki, at tað ber til at kalla teir sivilklæddu irakarnar ósekar, tí fleiri teirra, eisini kvinnur og børn, royndu at renna á amerikansku hermenninar við bilum sínum, siga teir.



# Neyðtøka vanligt vápn í kríggi

**Kríggj gerast alt meiri og meiri ræðulig, og einki mark er fyri, hvat verður gjørt fyri at raka fíggindan. Nógvastaðni eru tað kvinnurnar, sum líða undir hesum, sigur finska Elisabeth Rehn, sum hevur vitjað 14 krígsøki.**

KRÍGSRÆÐULEIKAR
*Árni Joensen*



Saman við liberisku kvinnuni Ellen Johnson Sirleaf hevur Elisabeth Rehn ferðast úr Eysturtimor til Kambodja, úr Miðeystri til Balkan, í Kolombia og haðani til tey ófriðarligu økini í Somalia, Sierra Leone, Liberia og Guinea.

- Nógvar av hesum ósemjunum hava ein felagsnevnara. Tað snýr seg um ræðið á landsins náttúrutilfeingi so sum diamantum, kokaini og olju, og tað er í hesum ósemjum, at vit síggja ta mest harðrendu framferðina, sigur Elisabeth Rehn. Sjálv hevur hon verið finskur verjumálaráðharri, men seinastu tíðina hevur hon arbeitt sum óheftur ST-serfrøðingur, og uppgáva hennara hevur verið at skriva eina frágreiðing um lutin hjá teimum báðum kynunum í sambandi við kríggj eins væl og frið.

Hon fekk eitt ár til uppgávuna, og hetta árið skuldi hon vitja tey ringast raktu krígsøkini. Serliga skuldi hon halda eyga við, hvussu kvinnurnar hava havt og hava tað, hvussu kríggj ávirkar teirra uppfatan av monnum og valdi, og hvørjir møguleikar eru fyri menning í økjunum.

### Skelkandi veruleiki

Elisabeth Rehn og Ellen Johnson Sirleaf tóku av avbjóðingini, og á teirri longu ferðini hava tær tosað við nógvar kvinnur, felagsskapir, politikarar og ríkisleiðarar í fjúrtan londum. Mikudagin kunngjørdu tær báðar frágreiðingina "Kvinnur, kríggj og friður" á einari ráðstevnu í Oslo. Veruleikin er skelkandi, sigur Elisabeth Rehn.

- Eg visti ikki, at neyðtøka er eitt so vanligt vápn í slíkum ósemjum. At kalla allar genturnar, sum vit hittu í Kongo, og sum vóru eldri enn tíggju ár, høvdu verið fyri neyðtøku, og meiri enn 90 prosent av øllum húskjunum har hava mist eitt ella fleiri, sum hava verið neyðtikin. Í Rwanda fingu allir HIV-smittaðir menn beinleiðis boð um at neyðtaka so nógvar kvinnur hjá fíggindanum, sum til bar.

- Aftaná høggja menninir aðra hondina av teimum neyðtiknu kvinnunum, ot vit sóu nógvar gentur og kvinnur, sum høvdu verið fyri hesari vanlagnu. Í øðrum førum løsta neyðtøkumenninir kynslutirnar hjá kvinnunum, so tær kunnu ikki fáa børn. Vit frættu eisini um menn, sum høvdu neyðtikið smábørn. Eg fati ikki, hvat tað eru fyri ómenni, sum kunnu gera slíkt. Tað ber ikki til at sammeta teir við djór, tí djórini bera seg ikki soleiðis at, sigur Elisabeth Rehn.

Bæði í Afrika og Asia er tað rættiliga vanligt, at krígsmenn fáa sær eina sokallaða "bush wife". Ofta eru hetta gentur niður í tólv ára aldur, sum verða noyddar at fylgja við krígsmonnunum. Tær kunnu flýggja, men tora ikki, og tær søgdu okkum, at tær kendu ein ávísan tryggleika at vera saman við hesum monnunum. Teir góvu teimum mat og ta neyðugu trygdina, men tá tær koma heimaftur, enda flestu teirra sum skøkjur, sigur Elisabeth Rehn.

### Eisini í Evropa

Á ferðini hava tær báðar kvinnurnar eisini verið á Balkan, har tær skuldu kanna, hvussu tað stendur til við mannarættindunum aftan á krígginí har. Elisabeth Rehn sigur, at heldur ikki har sleppa gentur og kvinnur undan ágangi, og hon leggur dent á, at tað eru ikki einans teir lokalu menninir, sum standa fyri áganginum. Síðani krígginí á Balkan er ein altjóða hjávera komin hagar, og í kjalarvørrinum á tí kom ein veksandi handil við kvinnum, sum verða seldar til eitt lív sum skøkjur.

- Eg havi tosað við fleiri hundrað av hesum gentunum, og tær søgdu mær, at millum teirra viðsakiftafólk eru bæði diplomatar, altjóða hjálparabeiðsmenn og átrúnaðarligir leiðarar, sigur Elisabeth Rehn.

Hon greiðir eisini frá, í høvuðsstaðnum í Makedonia, Skopje, er eitt marknaðartorg, har naknar gentur verða sýndar fram. Keypararnir eru menn, sum so eiga genturnar. Kanska gevur eigarin einum vinmanni gentuna, ella hann selir hana fyri hægsta boð. Hvagar hon fer, og hvat hon skal gera, viðkemur ikki eigaranum. Tær makedonsku genturnar greiddu teimum báðum ST-kvinnunum frá, at tær verða betri løntar, um tær játta at hava samlegu við monnum, uttan at teir nýta hít. Hava vit vandan fyri HIV-smittu í huganum, er hetta at spæla við lívið. Og hetta hendir í Evropa í 2003, sigur Elisabeth Rehn.

### Eisini sterkar kvinnur

Men tað eru ikki allar kvinnur, sum gerast offur. Tað finnast eisini nógvar sterkar og vitandi kvinnur í fleiri av hesum londunum. Í Somalia hittu tær kvinnur, sum vóru vorðnar leiddar av at taka ímóti altjóða hjálp, sum ofta bert er ein viðfáningur til gerandisdagin. Tær vildu heldur hava teldur og pening, og tær vóru til reiðar at taka lut í friðarsamráðingum og at taka politiska ábyrgd.

Eisini í Kongo hittu tær eisini kvinnur, sum ikki vildu lata seg kúga. Har høvdu kvinnufelagsskapir savnað pengar, so tær kundu senda umboð til friðarsamráðingarnar. Tað sama er í Irak, sigur Elisabeth Rehn. Hon veit um nógvar irakskar kvinnur, sum hava góða útbúgving, og sum eru til reiðar at taka lut í arbeiðinum at endurreisa landið. Men ofta renna kvinnurnar seg ímóti tí, sum verður rópt siður ella átrúnaður, sigur hon.

### Fýlist á ST

Hóast hon hevur verið í arbeiðsørindum fyri altjóða samfelagið, aftrar Elisabeth Rehn seg ikki við at finnast at júst ST. Hon heldur, at heimsfelagsskapurin nýtir ov mong orð, men ger ov lítið í verki, tá tað snýr seg um rættindini hjá kvinnum. Eitt nú vísir hon á, at tað er sjáldan, at nøkur kvinna fær leiðandi starv í ST, og tá samráðingar eru um frið ymsastaðni, skalt tú vera heppin at síggja eina kvinnu við borðið.

- At senda nakrar ST-menn at áleggja øðrum monnum at virða rættindini hjá kvinnum gevur ikki nakað tað neyðuga trúvirðið, sigur Elisabeth Rehn og leggur afturat, at tað er neyðugt at herða trýstið - ikki bert á felagsskapir, men á hvørja einastu landastjórn.

Hon heldur ikki, at tað er rætt at geva Kofi Annan, aðalskrivara skyldina av, at ST hevur ikki fylgt sínum egnu lyftum. Tað eru stjórnirnar, sum skulu gera tað neyðuga arbeiðið. Allar stjórnir.

*(Kelda: Aftenposten)*